# Heinze rósar Fergie

Hóast hann vil sleppa úr Manchester United til Liverpool, so hevur Gabriel Heinze eisini stundir til at rósa venjara sínum, Sir Alex Ferguson. – Hann dugir ótrúliga væl at handfara spælarahópin. Hóast vit hava ein stóran hóp, har allir ikki altíð kunnu spæla, so megnar hann at halda øllum til. Liverpool hevur boðið Manchester United 6,8 mió pund fyri spælaran, men enn vil Ferguson tó ikki selja.




# Real vil hava Kaka

Hóast Real Madrid longu hevur styrkt hópin við Christoph Metzelder, Jerzy Dudek og Javier Saviola, so sigur venjarin, Bernd Schuster, at teir framvegis leita eftir styrki. Ovast á listanum stendur brasilski Kaka, og sambært sponskum miðlum hevur felagið boðið Milan knappar 600 milliónir fyri spælaran. Eitt tilboð, sum verjandi Champions League meistararnir ikki hava hug at góðtaka.




...di Hildigunn Niclasen hjá Sílinum eftir sigurin hjá 5-mannaførum við kvinnum

Mynd: Álvur Haraldsen

# ...á heimasjógvi

tað var tó alla tíð Sílið, sum hevði munin. Til tíðir royndi Ørnin at gera ein vørr, men hvørja ferð svaraði Sílið aftur. Síðstu 300 metrarnar megnaði Sílið eisini at økja avgerandi um munin, og at enda var eingin ivi um, at henda róðurin fór Sílið at vinna. Á málinum vóru tær knappa bátslongd framman fyri Ørnina, meðan Ritan fyri fyrstu ferð í ár endaði millum tríggjar teir fremstu bátarnar á einum triðja plássi.

Við sigrinum tryggjaði Sílið sær bæði meistaraheitið og sigur á heimasjógvi og ólavsøku, og við hesum var hann eisini einasti bátur hjá Havanr Róðrarfelag, sum megnaði at vinna á ólavsøku.

## - Hatta var málið

Eftir flotta sigurin hjá kvinnunum umborð á Sílinum fingu vit orðið á Hildigunn Niclassen. Hon segði, at nú høvdu tær rokkið málinum.

- Hetta er heilt fantastiskt. Tað var málið hjá okkum at vinna bæði meistaraheitið og ólavsøkuróðurin, og við sigrinum hava vit eisini víst, at vit eru best, sigur Hildigunn.

Kappingin hevur í alt ár verið sera hørð, og tað hava serliga verið Sílið og Ørnin, sum hava kappast. Hildigunn sigur eisini, at tær vistu, at tær fóru at fáa harða kapping frá Ørnini.

- Vit vistu, at tað fór at vera hørð kapping í dag, og tí skuldi alt til í dag. Vit vistu tó, at vit høvdu klárað hetta fyrr, og vit gjørdu okkara besta í dag, og tað var gott nokk.

At enda legði ein sera fegin Hildigunn afturat, at nú skuldu tær bara út at feira tey bæði gullheiðursmerkini, sum meistaraheitið og ólavsøkuróðurin hava ført við sær.

# Havfrúgvin vann eisini ólavsøkuna




*Teir á Sílinum eru betri í hørðum veðri enn vit, og tí lógu teir eisini nógv betri fyri uttan fyri molan. Tá vit komu inn um molan bleiv veðrið tó betri, og so var eingin trupulleiki, segði Rókur Johannesen, róðursmaður á Havfrúnni, eftir róðurin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Einasta kapping, sum ikki var endaliga avgjørd undan ólavsøkuni, var kappingin hjá 5-mannaførum við dreingjum, men her megnaðu dreingirnar á Havfrúnni við einum fram úr endaspurti at vinna bæði meistaraheitið og ólavsøkuróðurin**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Kappingin hjá 5-mannaførum við dreingjum hevur verið rættiliga spennandi í ár. Tað eru Havfrúgvin og Sílið, sum hava vunnið allar róðrarnar í ár, men undan ólavsøkuni var kappingin um meistaraheitið mest sum avgjørd. Havfrúgvin skuldi bert hava tvey stig fyri at tryggja sær meistaraheitið.

Undanfarnu róðrarnir hava eisini víst, at Sílið hevur verið betri í hørðum veðri við eitt sindur av mótvindi, meðan Havfrúgvin hevur vunnið róðrarnar í góðveðir og í undanvindi, og tí var tann mest spennandi spurningurin undan róðrinum hjá 5-mannaførunum við dreingjum helst, hvussu veðrið fór at vera á tjóðardegi okkara.

## Baldrut uttan fyri molan

Veðrið var ikki so galið henda dagin, men uttan fyri molan var rættiliga baldrut. Tað vísti seg eisini skjótt, at tað var Sílið, sum legði harðast út. Teir løgdu seg nevniliga á odda alt fyri eitt, og Havfrúgvin tóktist ikki ordiliga at hótta 5-mannafarið hjá Havnar Róðrarfelag.

Sum tað leið inn ímóti molanum, gjørdist munurin bara størri og størri, og eitt skifti var ein heil bátslongd á muni millum Sílið og Havfrúnna, og her var nógv, sum bendi á, at Sílið fór at vinna ólavsøkuróðurin.

## Vendi innan fyri molan

Men brádliga kom vend í. Bátarnir komu inn um molan, og nú var veðrið brádliga heilt gott á sjónum. Tað gjørdist eisini beinanvegin greitt, at nú gekk betri hjá Havfrúnni, og spakuliga byrjaðu teir at eta meir og meir av leiðsluni hjá Sílinum.

Tað var tó alla tíðina Sílið, sum hevði munin, og tá bátarnir fóru undir endaspurtin, var ein hálv bátslongd á muni millum teir báðar fremst bátarnar, men hetta var ikki nokk hjá Sílinum.

Havfrúgvin hevði nevniliga ein øgiliga góðan endaspurt henda dagin, og í hvørjum taki tóku teir inn á Sílið. Teir megnaðu eisini at sleppa fram við hvíta havnarbátinum, tá teir nærkaðust málinum, og hesa leiðslu helt Havfrúgvin inn á málið. Við hesum vann Havfrúgvin FM og ólavsøkuróðurin, meðan Sílið mátti taka til takkar við silvurheiðursmerkjunum í bæði FM og á ólavsøkuni.

## - Heilt óluksáliga gott

Eftir róðurin fingu vit orðið á róðursmannin hjá Havfrúnni, Rók Johannesen, og hann var sera glaður.

- Hetta var heilt óluksáliga gott. Tað besta man kundi ynskja sær. Eg vil tó ikki siga, at vit høvdu væntað at vunnið róðurin í dag, men vit høvdu heilt víst vóna tað.

Vit spurdu hann síðani, hvussu tað bar til, at tað gekk so striltið hjá Havfrúnni uttan fyri molan.

- Har var eitt sindur av havaldu uttan fyri molan, og har eru teir á Sílinum betri enn vit. Innan fyri molan var veðrið tó nógv betri, og alt var við okkum, so tað var eingin trupulleiki, segði Rókur at enda.